## Fáa gott veður



- Góðir møguleikar verða fyri sól um vikuskiftið, sigur Petur Skeel, skilagóður veðurfrøðingur. Hann fer at liggja við eystur-ætt fyri tað mesta og eisini landnyrðingi, men at kalla eingin vindferð. Hóast sólin fer at kaga nógv fram um vikuskiftið, so slepst ikki undan, at møguleikar eru fyri mjørkaflókum. - Men tað verður turt og hitin fer at liggja millum 13 og 18 stig, sigur veðurmaðurin. Har mjørki er, verður hitin millum 10 og 12 stig. Í komandi viku verður kortini heldur kaldari. Hann hækkar, og tað verður nakað av ælaveðri. - Hitin fer tá neyvan upp um 10 stig, sigur Petur Skeel.

## Sparikassi hækkar rentuna

Suðuroyar Sparikassi hækkar rentuna, soleiðis at Bústaðarlán, við lægstu rentu, nú er 5,75 prosent. Mikudagin hækkaði Europeiski Meginbankin leiðandi rentuna við 0,25 prosentstigum. Eftir hetta boðaði danski Tjóðbankin frá, at eisini hann hækkaði rentuna, og við hesi hækking er diskontan nú komin upp á 4,00 prosent. Suðuroyar Sparikassi tillagar nú rentuna altjóða rentuni, soleiðis at Bústaðarlán, við lægstu rentu, nú er 5,75 prosent. Eitt nú verður hægsta rentan á 12 mánaða uppsøgn 4,50 prosent, og rentaná eftirlønarkonto 4,75 prosent. Rentan á vanligum innláni uttan uppsøgn verður óbroytt. Rentuhækkingin tók við í gjár

# Eldraheim við hugna, hita og humor



*Uttan fyri Norðurlandahúsið. Tey bæði Dr. Bill Thomas, upphavsmaður til Eden-arbeiðsháttin og danska Jane Verity, umboð fyri Eden í Norðurlondum*

**Persónligt frælsi, kærleiki og spontanitetur skulu setast í hásæti innan eldrarøktina. Hetta var niðurstøðan á stórari ráðstevnu hjá Nærverkinum um framtíðar eldrarøkt**

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

– "Her var gott at liva." Soleiðis skulu fólk kunna siga um tíðarskeiðið tey búðu á einum ellisheimi. Hetta var niðurstøðan á nemandi innlegginum hjá eldhugaðu Margaret Johannesen frá Giljagarði í Leirvík, har hugsunarhátturin frá The Eden Alternative er galdandi í gerandisdegnum.

### Livandi alternativ

Hósdagin var Norðurlandahúsið karmur um stóra ráðstevnu um framtíðar eldrarøkt, sum Nærverkið skipaði fyri. Eini 400 fólk við tilknýti til eldraøkið høvdu teknað seg til ráðstevnuna, sum snúði seg um nýggja røktarhugtakið "The Eden Alternative".

Sambærthugsjónini handan The Eden Alternative eru trý fyribrigdi, sum eyðkenna búfólkini á vanligum bústovnum: Einsemi, keðsemi og hjálparloysi. Til tess at bøta um trivnaðin, bæði hjá búfólkum og starvsfólkum, setir The Eden Alternative lív, gleði, anda og samanhald inn í staðin. Hetta verður eitt nú gjørt við at geva teimum búfólkunum húsdjór, nógvar livandi plantur, sum skulu røkjast, og vitjan av børnum. Alt við hugtøkum sum virðing, humor, kærleiki og sansastimulatión í miðdeplinum.

### Hugtikin ministari

Sambært landsstýrismanninum í Almanna- og heilsumálum Hans Paula Strøm er Eden-alternativið avgjørt gongda leiðin innan framtíðar eldrarøkt, og var hann sera hugtikin av hugsjónini handan hugtakið. Eisini segði hann seg vilja stuðla arbeiðinum at fáa betri trivnað á ellisheimum, við so líðandi at seta í verk Eden-hugsjónina innan alt eldraøkið.

Gestarøðarar á ráðstevnuni vóru upphavsmaðurin til Eden-arbeiðsháttin Dr. Bill Thomas og danska Jane Verity, sum er umboð fyri Eden í Norðurlondum. Eisini greiddu tær báðar, Haldis Joensen frá heiminum fyri minnisveik við Vallalíð og Margaret Johannesen frá Giljagarði í Leirvík frá um, hvussu tey nýta Eden í gerandisdegnum.

Sosialurin ger meira við málið í komandi viku.

*Eini 400 fólk við tilknýti til eldraøkið høvdu teknað seg til ráðstevnuna, sum snúði seg um nýggja røktarhugtakið "The Eden Alternative"*





*Bilarnir fylla vanliga nógv á Bryggjubakka. Í summar verður ikki loyvt at parkera fram við kai-kantinum*

# Ongin parkering á Bryggjubakka

**Tekniska nevnd hjá Tórshavnar býráð samtykti í gjárkvøldið at parkering fram við kei-kantinum verður ikki loyvd í summar**

Sambært Marin Katrinu Frýdal, forkvinnu í teknisku nevnd, verða parkeringsbásarnir tiknir burtur í summar, so summargestirnir kunna sita úti í góðveðrinum og njóta vakra útsýnið út á fjørðin.

- Eisini koma so nógvir spennandi útlendskir bátar á vitjan, og er tað munandi hugaligari at síggja teir, enn inn í útstoyti á bilunum, sigur Marin Katrina Frýdal, forkvinna í Teknisku nevnd hjá býráðnum.

Í fjør summar vóru nakrir av parkeringsbásunum á Bryggjubakka tiknir burtur, og borð og benkur vóru sett í staðin.

**rd**